# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Fleiri av okkara limum vórðu bukaðir við koyrli, og fleiri vórðu tiknir og settir í varðhald*

*(sakføraraformaður í Pakistan)*

# Sakførarar bukaðir og dómarar settir í húsavarðhald



*Pakistanska løgreglan fer harðliga fram ímóti teimum, sum seta seg upp ímóti undantaksstøðuni*

**Pakistanska løgreglan fer harðliga fram fyri at forða ófriði, nú landið er sett í undantaksstøðu**

Fleiri hundrað løgreglumenn høvdu kringsett rættarbygningin í pakistanska býnum Karachi, tá ein mótmælisgonga við fleiri hundrað sakførarum á odda kom hagar í morgun. Sakførararnir sýttu fyri at steðga uttanfyri, men tá teir royndu at sleppa inn í rættarbygningin, legði løgreglan uppí.

- Fleiri av sakføarunum vórðu slignir og bukaðir, og í Karachi vórðu umleið 50 av okkara limum tiknir og settir í varðhald, sigur Akhtar Hussain, fyrrverandi formaður í sakførarafelagnum í Sindh-landspartinum, við AFP.

Aðrar tíðindastovur vistu at siga, at umleið 2.000 fólk vóru komin saman uttan fyri rættarbygningin í Lahore, og at meiri enn 300 sakførarar vórðu tiknir. Eygnavitni greiddu frá, at fleiri av teimum tiknu vóru bundnir, og at summir bløddu.

Pakistanska dómarafelagið kunngjørdi í morgun, at løgreglan hevði forðað fleiri dómarum at sleppa til arbeiðis. Tað ljóðaði, at nakrir dómarar høvdu roynt at sleppa inn um byrgingarnar hjá løgregluni, og at løgreglan hevði tikið teir og sett teir í húsavarðhald.

Pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, sigur, at undantaksstøðan er neyðug, skal landið ikki sindrast orsakað av islamistiskum ágangi. USA og fleiri lond hava heitt á forsetan um at seta tær demokratisku skipaninar aftur í gildi sum skjótast.

# Tær hava felags heila

**Tvíburðarnir Dounaa og Ihsane hava hvør sín kropp, men felags heila**

Tær báðar genturnar vórðu føddar á einum sjúkrahúsi í marokkanska høvuðsstaðnum Rabat fyri næstan trimum vikum síðani.

Tær hava hvør sín kropp við ørnum og beinum, og tær hava síni eygu og egna nøs, men høvdini eru samanvaksin.

Professarin Ittaibi, sum arbeiðir á Avicenne-sjúkrahúsinum, sigur við fronsku tíðindastovuna AFP, at tað ber ikki til at skilja tær báðar genturnar frá hvør aðrari. Tískil noyðast Dounaa og Ihsane at liva saman alt lívið, men vanliga fáa siamesiskir tvíburðar ikki so langt lív.



*Læknarnir siga, at tað ber ikki til at skilja Dounaa og Ihsane frá hvør aðrari*

# Flogfar datt niður í Sao Paulo

*Minst átta fólk, teirra millum eitt barn, doyðu, tá eitt lítið flogfar datt niður í ein býling í brasilska stórbýnum Sao Paulo í gjár. Bara tveir menn vóru í flogfarinum, og sum skilst átti annar teirra flogfarið. Loftferðslumyndugleikarnir siga, at flogfrarið var júst farið á flog, tá tað datt niður*



## STUTT SAGT

### Ætlar sjálvur til Iran

Verður Barrack Obama amerikanskur forseti aftan á valið næsta heyst, ætlar hann sær til Teheran at ringast við teir iransku leiðararnar fyri at fáa eina loysn á ósemjuni um landsins kjarnorkuætlanir. Obama heldur, at tað kemst ongan veg við teirri hørðu kósini, sum stjórnin í Washington hevur sett í hesum máli, og at ósemjan skal loysast við tingingum. Og verður hann forseti, fer hann at átaka sær uppgávuna persónliga, sigur hann.

### Merkel skottrygg

Rættiliga óvæntað var týski kanslarin, Angela Merkel, í Afghanistan og vitjaði leygardagin. Týskland hevur 3.000 hermenn í Afghanistan, og higartil hava 23 týskir hermenn latið lív í samanbrestum og atsóknum har. Undir vitjanini hitti Angela Merkel leiðararnar hjá teimum týsku hermonnunum og afghanska forsetan, Hamid Karzai. Vitjan hennara var hildin loynilig, hon koyrdi alla tíðina í einum hernaðarakfari og var alla tíðina í skottryggum vesti.

### Dýrt avfall

Tað regnaði óvanliga illa í Danmark nakrar dagar í summar, og nú hava tryggingarfeløgini roknað seg fram til., at tað nógva regnið gjørdi skaða fyri næstan 600 mió. krónur. Grimdarregnið kom í trimum umførum. Tað fyrsta var á Sælandi fyrst í juli, tað næsta á Keypmannahavnarleiðini ein mánað seinni, og tað seinasta var í Suðurjútlandi síðst í august. Tryggingarfeløgini fingu fráboðan um meiri enn 32.000 skaðar. Nógv tær flestu fráboðaninar komu frá privatfólki, men fleiri vinnuvirkir fingu eisini stóran skaða av regninum.